VIÐMERKINGAR

# Kultur-kalejdoskop

**Heri Mohr**

Í framkomnum londum, har demokratiið støðugt og áhaldandi verður fjálgað og vegleitt av politiskum eygleiðarum, er tað ongin dansur á rósum at vera ministari, tí uttan mun til um tað er kulturur, ung, gomul, sjúk ella annað øki í samfelagnum, hann er settur at røkja, so skal lítið til, áðrenn taburettin verður skrikt undan honum.

Dømini eru legio.

Álit og trúvirði og hugburður mynda tann dámliga ministaran, og er hann eisini virkin og engageraður, kunnu vit tosa um ein dámligan og arbeiðssaman ministara.

Í farna mánað helt okkara landsstýrismaður í mentamálum røðu á landsskjalasavninum í sambandi við, at Chr. Matras hevði fylt 100 ár. Røðan stóð í Sosialinum nakrar dagar seinri.

Hesin eftir øllum at døma sera »belisni« maður – vánaligt føroyskt, men kanska ikki aftan fyri at siga meta í staðin fyri halda, meting fyri áskoðan ella meining, koma at fáa í staðin fyri fara at fáa – altso, hesin bókliga íblásti maður, sum sambært Oddvør Johansen gongur við yrkingasøvnum í reyvarlummanum, avmyndaði við oratoriskum kynstri eitt satt kalejdoskop av kulturpersónum, heimskendum rithøvundum yrkjarum, stokkonservativa ummælari, kollveltingarmanni, pensioneraðum pantifúta o.ø.

Her var landsstýrismaðurin eitt sindur óheppin, tí hann átti at vitað, at í hesum landi finst ongin pensioneraður pantifúti av teirri einføldu orsøk, at pantifútastørv hava (tíverri) ikki tænastumannastatus. Men at seta ein fiktivan pantifúta úr Føroyum undir liðina á Jean-Paul Sartre prógvar, at landsstýrismaðurin, »ein primitivur skipari av bygd«, fyri at brúka hansara egnu terminologi, hevur humoristiskan sans.

Nú eru pensionistar lætt mál, og ilt er at verja seg fyri teimum vápnum, sum ávísir landsstýrismenn kanska liggja inni við, tá ið vit eftir øllum at døma neyvan sleppa upp í amerikonsku rakettverjuskipanina.

# Viðmerkingar til tað Hanus Joensen

**Hallgerð Arge Hansen**

Í Dimmu 10. jannuar 2001, um at gera royndir við innlæringini.

Ingvard Lundberg, Psykologiska institutionen, Gøteborgs universitet, greiddi í einum fyrilestri, hann helt í november 2000, frá altjóða kanningum um lesiførleikan hjá vaksnum fólki í 22 londum.

Heitið á fyrilestrinum var nakað soleiðis: Kunnu altjóða samanberingar hjálpa okkum at skilja, hvussu vit læra at lesa.

Tá ið talan var um donsk børn, sum lósu so illa í 3. flokki, men kláraðu seg væl í 8. flokki, kom Ingvard Lundberg inn á, at summi úrslit kunnu vera ivasom, tí kanningarnar vóru gjørdar á enskum og amerikonskum grundarlagi, har ikki var hugsað um munin millum stavihátt og tað talaða málið í teimum ymisku londunum og tann møguleika, at uppgávurnar kunnu vera mistulkaðar.

Tað er týdningarmikið, at bólkarnir, sum verða kannaðir, kunnu vera samanbornir, hava sama sosiala og mentanarliga grundarlag, og at innihaldið hóskar til tað mentanarliga grundarlag, børnini hava.

Tað er heldur ikki vist, at børnini hava skilt tað, tey lesa, sjálvt um tey lesa raðið.

Um lesiførleikan hjá vaksnum fólki í teimum 22 londunum vísti hann á, tá ið talan var um lesa prosa, lá Danmark sum nr. 8.

Tá ið talan var um yrkisbókmentir lá Danmark sum nr. 3, Noreg og Svøríki lógu sum nr. 1 og 2, og tá ið talan var um lesa hagtøl og viðgera tey, lá Danmark sum nr. 2. Bara 10% danskarar lósu sum børn í 3. flokki.

Í USA, Stórabretlandi og Nýsælandi lósu meira enn 20% av teimum vaksnu sum børn í 3. flokki.

Hevur tað tí so stóran týdning, at tey lósu so illa í 3. flokki?

Lundberg vísir til hesar keldur:

1992 Elley, W,E How in the World do students read? Haag: IEA
2000 Gabrielsen, E Slik leser voksne i Norge Stavanger: Senter for leseforskning

1992 Lundberg, I Linnakyla, P
The teaching of reading around the world Haag: IEA

2000 OECD and Statistics Canada
Literacy in the information age: Final report of the Adult Literacy survey Paris: OECD

Eg havi sjálv gjørt eina lesikanning við umleið 150 børnum úr 3. flokkum kring landið.

Ein norðurlendskur granskari hevur verið uppi í millum annað fyri at tryggja, at ein partur av úrslitunum kunnu verða borin saman við onnur Norðurlond. Uppgávurnar eru lagaðar, so tær hóska til okkara børn. Endamálið við hesi kanning er millum annað at vita, um til ber at fáa eyga á nøkur heildarmynstur og viðgera tey í einari almennari frágreiðing. Eitt annað endamál er at fáa eyga á, um stórur munur er á børnunum og soleiðis geva tí einstaka barninum ta avbjóðing, tað hevur tørv á, bæði tí barninum, sum er sera væl fyri og tí barninum, sum hevur stuðul fyri neyðini.

Men eg kann nevna, at júst tað, at børn kunnu lesa raðið, hóast tey ikki skilja innihaldið í tí, tey lesa og øvugt, at børn lesa illa upp og kortini skilja væl innihaldið í tekstinum, kom týðuliga fram her.

At tað er komið út í orð, at donsk børn í 3. flokki lesa so illa, hevur gjørt, at størri dentur verður nú lagdur á byrjanarlesingina í donskum skúlum.

Endamálið við einari lesikanningini í byrjanarundirvísingini eigur at vera at finna fortreytir og møguleikar hjá tí einstaka barninum og at laga undirvísingina, so at hon hóskar til øll børn, tí øll børn kunnu læra, sum Hanus Joensen eisini nevnir, men øll børn í einum fyrsta flokki eru ikki á sama menningarstigi, og tað er av størsta týdningi at hava í huga.

Tað er eisini ymiskt, hvørjar lesiteoriur og hvørji prinsipp lærarin hevur um lesitilgongdina.

Her vil eg vísa til greinina Ymisk sjónarmið um at lesa, sum stóð í skúlablaðnum nr. 7 desember 2000.

# Kommunistiskir vegleiðarar – boðar ikki frá góðum

**Johan Samuelsen**



Alt týðiligari verður tað fyri hvønn dag sum gongur, at fólkini aftan fyri herferðina fram ímóti loysingini eru fyri stórsta partin fyrrverandi kommunistar.

Fyri stuttum var sending í SvF, sum nevndist: Danmark undir kalda krígnum. Ónøgdin við hesa sending niðri hevur verið sera stór, tí mangan kendist tað sum fólkini, sum skuldu lýsa viðurskiftini undir kalda krígnum, heldur nýttu høvi í sjónvarpinum at verja fortíðarinnar syndir, heldur enn at greiða fólki frá, hví tey m. a. framdu landasvik fyri kommunistisku londini fyri eystan. Men grundin var so sólaklár! Stjórin í DR 2, sum gjørt hevur sendingina, hevur sjálvur, sum fyrrverandi kommunistiskur agentur, roynt at skava út yvir, hóast hann og mong við honum eru vorðin avdúkaði síðani Múrurin fall!

Í Føroyum hava vit kannað hvønn leiklut Nato, t. v.s. í okkara føri danir og amerikumenn, høvdu undir kalda krígnum, og út er komin Svarta bók, men enn er onki vorðið kannað av tí, sum nú hevur ligið tókt fyri almenninginum, í Moskva og í Eysturberlin í meiri enn 10 ár – hví verður drálað við hesi kanning, harra løgmaður? Pengar tørva, verður sagt, men er tað nú allur veruleikin? Er tað ikki heldur tí, at hin stóri samgonguflokkurin í Tinganesi eitur Tjóðveldisflokkurin, og slík kanning kann skaða umdømi hansara upp undir fólkaatkvøðuna við óteljandi kommunistisku líkunum í lastini? Tí her í Suðurstreymi var ørgrynni av kommunistiska slagnum í tí flokkinum, har eyguni fóru at glógva, bara tú nevndi Lenin ella Stalin, og tey høvdu enntá Føroyskt - Sovjetiskt vinafelag at stytta sær stundir saman í og lovprísa "paradísinum" fyri eystan, umframt mótmælisgongurnar í Mjørkadali á hvítusunnu! Men tey hvurvu frá einum degi til annan, tá Sovjetsamveldið datt sundur.

Nú hevur verið friður í almenna samfelagstjakinum av hesum hetjudyrkarum Sovjetsamveldsins síðani Múrurin fall í 1989 – men nú er vent í holuni. Nú eru tey komin undan kavi aftur við veldi. Hava kastað kommunistiska hamin av sær og smoygt seg í tann nationalistiska (enntá, í ymsum alment fíggjaðum stuðulsfelagsskapum!), og eru farin í stórum tali upp í "frælsiskórið" hjá Høgna Hoydal. Í hvussu so fittur hann enn kann vera á skíggjanum at síggja til, so eru hann og samgongan við at føra okkum út av eggini! Við ógvusligum yvirtøkum fyri 100 tals milliónir, við øktum skatti sjálvandi eisini í 100 millióna klassanum fyri at halda tørn á fíggjarlógini, og so einum blokki, uppá 1000 milliónir, sum hvørvur eftir 4 árum – hetta er "galimatias", sum Havnamaður tók til um dagarnar. Men at verja henda galskapin hóvar júst gomlu kommunistunum væl – teir eru beinleiðis á heimavølli at gera svart til hvítt, uttan samvitskubit, teimum so líkt! . Hóast vit øll onnur væl vistu hvørjir ræðuleikar valdaðu í kommunistisku londunum fyri eystan, so gingu okkara kommunistar og lovprísaðu hesum somu londum, og tí eirindaleysu einaræðisskipan, sum har valdaði, og søgdu okkum øðrum, at trupuleikin, hví vit vanligu einki skiltu, var hann, at har valdaði "vísindaliga" kommunisman, og tað mátti man í minsta lagi vera akademikari fyri at skilja! Sjálvt forfylgingin av teimum kristnu varð láturliggjørd av okkara kommunistum – hvør minnist ikki Wurmbrand-stríðið t.d.?

Somu "kynisku" sjónarmið eru at finna aftur í nationalistisku herferðini upp undir fólkaatkvøðuna – fyrrverandi kommunistiska "klikan", núverandi nationalistaklikan, sum altíð megnar at vera omaná, líkamikið hvør samfelagsskipanin er, heldur seg altíð vita best, og er sum skapt til at leiða fjøldina, sum ikki dugir at hugsa sjálv! Hesi sjónarmið eru vandamikil. Og eftir bestu sannføring míni, eru viðvirkandi til, at taka allar skorðar undan okkara vælferð í heilaga navni nationalistanna, fáa teir makt, sum teir hava akt – tað verður "gamblað" við vælferðini hjá 46.000 føroyingum – tá alt tjóðskaparstakkalastásið er pilkað uttanav, so er hetta onki annað enn karrá nationalisma, sum ongantíð hevur tænt vanliga fólkinum í nøkrum landi, mær vitandi? Men hava altíð verið, væl at merkja í ymiskum hamum, skutilsveinar hjá øðrum óhugnaligum kreftum bæði á uttasta høgra- og vinstraveingi, har hesir bólkar aloftast hálsfevnast í onkrari ismu, tað veri seg fasismu ella kommunismu – og hjá okkum bleiv tað so í nationalismuni! Og her er tað prógvað í ólukkumát, at politisku metingarevnini hjá hesum fólkum, sum hava fjeppast uppi í ismunum, eru út av lagi vánalig, samanber pástandirnar hjá ismufólkunum um "paradísini" fyri eystan og so syndarliga veruleikan!

Nú hesi fólkini aftur eru farin upp at blása og fortelja okkum øðrum "deyðiligu", hvussu ófført alt fer at vera, bara um vit atkvøða ja tann 26. mei, tá er beinleiðis vandi á ferð – politisku metingarevnini og politisku lygnirnar eru tey somu sum áður – tí atkvøða vit Nei í Mei.



# Gávugóðs til Rannvá

**Fyrsta gávugóðsi úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum fer til Rannvá Pálsdóttir Kunoy. Listakvinnan fær 60.000 krónur, sum vórðu handaðar á samkomu á Fróðskaparsetrinum ígjár**

MENTAN

*Birgir Kruse*

Rannvá Pálsdóttir Kunoy er undir útbúgving í London. Hon er 25 gomul og hevur lokið BA prógv á City and Guilds of London Art School. Nú gongur Rannvá á víðagitna Royal College of Art, Fine Painting í London, har hon verður liðug í juni.

»Rannvá brýtur upp úr nýggjum og gongur nýggjar leiðir« segði Malan Marnersdóttir, tá hon í gjár handaði gávogóðsi, áljóðandi 60.000 krónur. »Stuðulin verður latin henni, fyri at hon kann halda fram útbúgvingarleið sína« segði Malan, sum er formaður í nevndini, ið ger av hvør skal fáa stuðul, ella sum í hesum føri – gávugóðs.

Rannvá, sum var komin heim at taka í móti gávugóðsinum, takkaði fyri og segði, at hetta var ein stórur heiður. »Tað er stórt fyri eitt listafólk at fáa eina tílíka gávu; tað gevur álit, styrki og mót at halda fram« segði Rannvá á samkomuni, har familia hennara eisini var til staðar.

Karmurin um handanina var gamla landsbókasavnið, ásjónligi og eyðkendi bygningurin, har Seturskrivstovan og eisini ein nýggj altjóða skrivstova heldur til. Gróthúsið á Debesartrøð nevnir onkur tað.

Rannvá hevur havt serframsýning í Listasavni Føroya og tikið lut í framsýning í London, Keypmannahavn og Reykjavík. Listasavnið og Statens Kunstfond hava keypt verk hjá henni.

Ikki kann sigast annað, enn at hetta er ein heppin avgerð, at fyrsta gávugóðsi úr hesum privata grunni varð latið til í fyrsta lagi eina kvinnu og í øðrum lagi eitt listafólk, sum við altjóða flogi gongur egnar og avgjørt nýggjar leiðir.



*Rannvá fær stuðul fyri at hon kann halda fram útbúgvingarleið sína. Í løtuni gongur hon á Royal College of Art í London*

*Mynd: Jonhard Hammer*



*Listakvinnan Rannvá Pálsdóttir Kunoy (f.1975) fær fyrsta gávugóðsið úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum. Við hennara lið eru foreldrini Páll og Solveig*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Peningaupphæddin, sum verður latin, stavar frá rentunum av stovnfænum í Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum. Nevndin ásetur upphæddina, sum verður latin til gávus, og sær til at realvirðið á stovnsfænum ikki lækkar í virði.

Torvald Poulsen, sum var garðyrkismaður í Havn, doyði 87 ára gamal hin 11. februar 1999. – Seinasta ynski Torvalds var at stuðla mentanini, sigur bróðursonurin Regin av Steinum. Endamálið við grunninum er, at stuðla upp undir útbúgving hjá ungum føroyskum listafólki, sum hava sýnt listarligar gávur.

Malan Marnersdóttir er formaður í nevndini, ið letur gávugóðsið úr grunninum. Hinir báðir limirnir eru Jórun í Dali, formaður í LISA og Elsa Birgitta Pálsdóttir Petersen formaður í Føroya Lærarafelag. Bæði endamál fyri grunnin og manning í nevndini er eftir ynski frá Torvaldi Poulsen.

Í Internet-Sosialinum skrivar Oddfríður M. Rasmussen rithøvundur hugleiðingar, eftir at hava sæð framsýning hjá heiðraðu listakvinnunu Rannvá Pálsdóttir Kunoy, har mannakroppurin var í fokus. Av tekniskum ávum verður teksturin ikki á prenti fyrr enn í næsta "Vikuskifti".

Sosialurin ynskir Rannvá hjartaliga tillukku!

# Móttøka á Bakka í gjár

**Eimskip og Hafnarbakki høvdu almenna móttøku í nýggju saltgoymsluni á Glyvrum í gjár**

HANDILSVINNA

Seinnapartin í gjár var samkoma í nýggju saltgoymsluni á Glyvrum. Tað vóru Eimskip og Hafnarbakki, sum í felag eiga nýggju saltsøluna, ið høvdu boðið umboðum fyri ymsar fyritøkur inn á gólvið.

Nýggja saltgoymslan heldur til í spildurnýgjari høll, sum bygd er á havnarlagnum á Bakka. Høllin varð bygd seinasta heyst, og fyrsta lastin varð løgd inn í høllini stutt áðrenn jól.

Føroysk Saltsøla, og seinni MJ Saltsøla, hava annars mestsum havt einarætt at selja salt á føroyska marknaðinum. Onkuntíð hevur onkur roynd verið gjørd at koma inn á marknaðin við øðrum enn Ibiza saltinum av Vestaru Bryggju í Havn. Men tær royndirnar eru bara burtur dotnar aftur.

Nú royna so Eimskip og Hafnarbakki at taka kappingina upp við gomlu gigantarnar á føroyska saltmarknaðinum.

**ej**

*Fyrsta lastin til nýggju saltsøluna varð løgd upp stutt fyri jól í fjør*

